Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 29.05.2019 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208 - Gerðabók
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
75/19	19/00665-1	Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2018 - Klaksvíkar kommuna
76/19	15/00890-80	Broyta viðtøkur í vinnuliga útbúgvingargrunninum
77/19	19/00598-3	Broyta orðing í ognarbrøvum – grundstykkjalistin
78/19	17/01397-12	Serstøk Byggisamtykt í miðbýnum - dagføring og tillaging
79/19	19/00543-2	Sundurbýti av matr.nr. 26 í Árnafirði
80/19	19/00287-7	Útbygging av vatnverkinum við Ánagjógv
81/19	19/00136-5	Hoyriútgerð til skúlanæming á Skúlatrød – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
82/19	17/00148-87	Minnisvarði - Elinborg Lützen, listakvinna 100 ár – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
83/19	19/00472-8	Játtanin til NR – játtan í mun til tørvin – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
84/19	18/01235-10	Meirútreiðslur vegna økt barnatal í Snjallubjallu – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
85/19	19/00502-4	Tónlistaskúlin - hækkað lønarstøði eftir sáttmálasamráðingar – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

75/19
19/00665-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2018 - Klaksvíkar kommuna

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	28.05.2019	60/19
2 Klaksvíkar Býráð	29.05.2019	75/19

Frágreiðing um málið:
Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Sambært § 46 í kommunustýrislógini, skal býráðið eisini taka støðu til val av grannskoðara. Greinin er soljóðandi:

"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.
Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".

Í samband við fíggjarliga partin verður vístt til s. 11 í ársroknskapinum (fíggjarstøða) og hesar talvur í protokollini: 4.1.6 eykajáttanir, 4.1.7 roknskapartøl 2012-2018, 4.1.8 nýtslan í mun til játtan, 4.1.10 lyklatøl, 4.2.7 langfreistað skuld.

Vístt verður eisini til mál 19/00547: kunning um likviditetsstøðuna, sum varð viðgjørt í seinasta umfari. Har eru bert smærri broytingar hendar síðani tá – ca. 110 tkr. (jólagávur til starvsfólk) eru fluttar frá kommunufyristing (umsiting annað) og bókað út á deildirnar og avseting skuldaratap, 294 tkr., sum er bókað barnaansing, tónlistaskúla, vegir og Kl. Havn.

Formansfrágreiðingin verður væntandi klár mánadagin.

Fylgisskjøl
- Roknskapur 2018 – uppskot (76 síður)
- Grannskoðanarprotokoll 2018 – uppskot (25 síður)

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin:
> **§ 46**. Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.
> *Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.
> **§ 53**, stk. 2, 1) roknskapurin skal verða landsstýrinum í hendi innan 1. juni eftir endað fíggjarár.

Fíggjarligar avleiðingar:
Roknskapurin vísir 13,1 mió. kr. í halli, og eftir avdráttir er hallið 15,1 mió. kr.
Inntøkurnar eru 271,6 mió. kr., rakstur 198,9 mió. kr., íløgur 75,8 mió. kr., rentustuðul 3,6 mió. kr. og fíggjarpostar 6,3 mió. kr.

Áogn skuldarum og skattaeftirstøðum v.m. er 15 mió. kr, áogn hjá Gjaldstovuni 33,1 mió. kr. og innistandandi 24,6 mió. kr.
Lániskuldin er 142,3 mió. kr., og við leysaskuldini er samlaða skuldin 166,1 mió. kr.
Nettoskuldin er 93,3 mió. kr., sum svarar til 0,42 í mun til álíkningina.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

Verður undirskrivað í býráðsfundinum.

Fíggjarnevndin 28. mai 2019
Nevndin tekur undir við uppskotinum og mælir býráðnum til at góðkenna og undirskriva roknskapin og grannskoðanarprotokollina fyri 2018.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2018 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll einmælt góðkendur. Harumframt einmælt samtykt at lata SPEKT halda fram sum grannskoðari kommununnar.

Jógvan Skorheim borgarstjóri, fór av fundinum kl. 18:45, og Signhild V. Johannesen, 1. varaborgarstjóri tók yvir fundarleiðsluna.

76/19
15/00890-80 Broyta viðtøkur í vinnuliga útbúgvingargrunninum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	20.05.2019	27/19
2 Klaksvíkar Býráð	29.05.2019	76/19

Frágreiðing um málið:
Eftir ynski frá nevndini fyri Vinnuliga Útbúgvingargrunnin samtykti Havna- og vinnunevndin 20-02-2019, at umsitingin skuldi kanna, hvørt tað ber til at víðka endamálið hjá grunninum, so hann ikki longur er avmarkaður til verkætlanir innan fiski-, skipa- ella frálandavinnu.

Spurningurin hevur verið vendur hjá Bárði Larsen, uttanhýsis løgfrøðingi, sum sigur:

> *"Eg meti heilt greitt, at hetta er í lagi. Kommunali áhugin eigur ikki kunna vera avmarkaður til ávísar vinnur. Allar vinnur eiga potentielt at hava eins stóran kommunalan áhuga.*
> *So, eg meti hasa eins væl sum gomlu orðingina liggja innanfyri kommunufulltrúina."*

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at broyta § 4, so hon verður soljóðandi:

Grunnurin kann veita stuðul til vinnulig tiltøk, ið stuðla undir útbúgving, har nevnd grunsins metir, at tiltøkini eru nýhugsandi og nýskapandi.

Treytir fyri at fáa stuðul eru:

a) Tiltakið/verkætlanin er alment gagnlig fyri Klaksvíkar kommunu.
b) Tiltakið/verkætlanin umboðar vinnuliga nýhugsan.
c) Tiltakið/verkætlanin væntandi kann verða við til at lyfta vinnuna í Klaksvík á eitt hægri støði.

Havna- og Vinnunevndin 20. mai 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, men við hesari broyting í c).
c) Tiltakið/verkætlanin væntandi kann verða við til at lyfta vinnuna í Klaksvíkar kommunu á eitt hægri støði.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá HaVN 20-05-2019 einmælt samtykt.

Jógvan Skorheim, borgarstjóri, kom aftur á fundin kl. 18:50 og tók aftur fundarleiðsluna.

77/19
19/00598-3 Broyta orðing í ognarbrøvum - Grundstykkjalistin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.05.2019	80/19
2 Fíggjarnevndin	28.05.2019	69/19
3 Klaksvíkar Býráð	29.05.2019	77/19

Frágreiðing um málið:
Tað hevur í eina tíð verið trupult hjá borgarum at fáa fólk/fyritøkur at grava út til grundstykkir og at byggja hús. Hetta hevur gjørt, at fólk blíva ótrygg við at keypa eitt grundstykki, har byggifreistin er tvey ár. Tvey ára freistin hevur eisini gjørt, at keyparar halda seg aftur við at keypa eitt grundstykki frá kommununi.

Í hesum sambandi skjýtur umsitingin upp at seta eina orðing inn í ognarbrævið, sum gevur keyparanum undantaksloyvi frá vanligu 2 ára treytini.

Orðing í ognarbrævi í dag:

3. *Keyparin pliktar seg til at byrja húsabyggingina á grundina uttan óneyðugan støðg og í seinasta lagi 10 mánaðar aftaná dagfestingina av hesum ognarbrævi. Byggingin skal verða liðug, áðrenn 2 ár eru liðin frá nevnda degi.*

Uppskot til nýggja orðing í ognarbrævinum:

3. *Keyparin pliktar seg til at byrja húsabyggingina á grundina uttan óneyðugan støðg og í seinasta lagi 10 mánaðar aftaná dagfestingina av hesum ognarbrævi. Byggingin skal verða liðug, áðrenn 2 ár eru liðin frá nevnda degi. – Tala serligar umstøður fyri tí, kann tó gevast undantaksloyvi frá hesi reglu, og verður keyparin í slíkum føri at seta seg í samband við Klaksvíkar kommunu fyri at avtala nærri.*

Keyparin skal søkja kommununa um loyvi til hetta, og verður umsóknin skrásett í 360.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember um alment útboð av kommunalari fastogn

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndirnar taka undir við málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. mai 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-05-2019 og mælir til fylgjandi ískoyti til pkt. 3 í ognarbrøvum:

3 c: Um eigari ynskir at lata grundstykkið inn, verður tað til upprunaliga grundstykkjaprísin og ikki við møguligum byggiútreiðslum.

Fíggjarnevndin 28. mai 2019
Nevndin tekur undir við UBN 20-05-2019.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá FíN 28-05-2019 einmælt samtykt.

78/19
17/01397-12 Serstøk Byggisamtykt í miðbýnum - dagføring og tillaging

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.05.2019	75/19
2 Klaksvíkar Býráð	29.05.2019	78/19

Frágreiðing um málið:
Vísandi til býráðssamtykt frá 14-12-2017 er tillagað uppskot til Serstøku Byggisamtyktina nú við at vera klárt til framløgu.
Í tráð við nevndu býráðssamtykt umfatar dagføringin – umframt regulering av verandi byggifeltum og -hæddum - eisini økið vestanfyri Vágsá til parkeringshús.
Sí hjáløgdu skjøl. (feltini markerað við reyðum eru spurningar, sum Tekniska Fyrisiting hevur sett miðbýararkitektinum, tí ósamsvar er í tekstinum. Vit bíða í løtuni eftir svari haðani)

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Hevur nevndin ongar viðmerkingar, verður uppskotið lagt til almenna framløgu, so skjótt endaligu upplýsingarnar fyriliggja.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. mai 2019
Nevndin hevur ongar viðmerkingar og tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-05-2019 – treytað av, at ongin týðandi broyting verður í svarinum frá miðbýararkitektinum.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá UBN 20-05-2019 einmælt samtykt.

79/19
19/00543-2 Sundurbýti av matr.nr. 26 í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Árnafjarðarnevndin	09.05.2019	6/19
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.05.2019	77/19
3 Klaksvíkar Býráð	29.05.2019	79/19

Frágreiðing um málið:

Í áheitan frá 23. apríl 2019 biður Umhvørvisstovan um kommununar ummæli til, at matr.nr. 26 í Árnafirði verður sundurbýtt við tí endamáli, at sethúsaognin í Viðurbyrgi 12 og neystagrundin Niðan Mannaskarð verða skrásett við hvør sínum sjálvstøðugum matrikli.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini

Árnafjarðarnevndin 09. mai 2019
Málið verið til kunning.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. mai 2019
Nevndin hevur ongar viðmerkingar til málið.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið, dagf. 26-04-2019, einmælt samtykt.

81/19
19/00136-5 Hoyriútgerð til skúlanæming á Skúlatrød – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	21.05.2019	31/19
2 Fíggjarnevndin	28.05.2019	63/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	29.05.2019	81/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	27.06.2019	

Frágreiðing um málið:
Eftir áheitan frá umsitingini hevur løgfrøðiligi ráðgevin hjá Kommunufelagnum nú kannað spurningin um, hvør hevur lógarskyldu at gjalda hesa útgerð, og kemur hann til tað niðurstøðu, at kommunan eigur at gjalda, sí viðheft skriv frá kommunufelagnum.

Lógargrundarlag:
Vegleiðing til ásetingar um markamót sbrt. § 18 b, stk. 5 og 6 um hjálparráð í forsorgarlógini og sbrt. §§ 7 og 8 í kunngerð nr. 18 um stuðul til hjálparráð frá 2010.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samlaði kostnaðurin fyri útgerðina er 67.000 kr. íroknað kommununnar part av mvg.

Umsitingin hevur onga kontu at vísa á til fígging av hesi útgerð.

Tilmæli:
Málið verður við hesum lagt fyri politisku skipanina við tilmæli um, at kommunan keypir hesa útgerð til skúlan at eiga og brúka. Mælt verður til at fíggja hendan eykakostnað við eykajáttan á 67.000 kr. til Skúlatrød, undirvísingartilfar.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. maj 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 15-05-2019

Fíggjarnevndin 28. mai 2019
Nevndin tekur undir við B&U 21-05-2019.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá FíN 28-05-2019 einmælt samtykt.

82/19
17/00148-87 Minnisvarði - Elinborg Lützen, listakvinna 100 ár – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.05.2019	82/19
2 Mentanarnevndin	21.05.2019	47/19
3 Fíggjarnevndin	28.05.2019	61/19
4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	29.05.2019	82/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	27.06.2019	

Frágreiðing um málið:
Sum kunnugt hevur ein verkætlanarbólkur arbeitt við at fáa standmynd reista til minnis um Elinborg Lützen, sum hevði verðið 100 ár 26. juli 2019.

Tíverri er ætlanin komin nakað í drag og er nýggj tíðarætlan ásett til 24. september 2019 at avdúka standmyndina, tá ið Norðoya Sparikassi eisini fyllir 100 ár (Norðoya Sparikassi hevur stuðlað verkætlanina væl).

Kostnaðarætlan - Lund og lendisarbeiði omanfyri Faktorshúsini:

		A -Tekniska deild	*B -Tilboð*
5 parkeringsbásar norðanfyri	70 m^2 x kr. 1.500,-	kr.110.000,-	kr. 110.000,-
Flísalegging kring standmynd	100 m^2 x kr. 3.000,-	kr. 300.000,-	kr. 196.000,-

Grevstur og steinseting		kr. 100.000,-
Kantsteinar		kr. 63.625,-
Trappur frá túninum niðan í lundina	kr. 50.000,-	kr. 28.350,-
Gøta niðan í økið		kr. 20.000,-
Ljós í økið	kr. 120.000,-	kr. 120.000,-
Gróðurseting av lund/skipan av lendi	kr. 100.000,-	kr. 100.000,-
Annað ókent	kr. 100.000,-	kr. 100.000,-
	kr. 780.000,-	kr. 837.975,-

3 – Afturat hesum verður mett til sjálvt haldið neyðugt at seta av kr. 60.000,-

Tilmælið við kostnaðarmeting (A) er samtykt í 2017, men peningurin er ikki settur av á fíggjarætlanina 2019 til endamálið, men í samráð við borgarstjóran er arbeiðið sett í verk, hetta við heimild í kommunustýrislógini § 21 og 31.

Tí hava borgarstjórin og nevndarforkvinnan í hesum føri sæð seg noydd at brúka omanfyri nevndu heimildir og seta byrjandi arbeiðið við hesi verkætlan í gongd, áðrenn ov seint er.

Tað er orsøkin til, at arbeiðið er byrjað, og í næstum verður fíggingarleisturin lagdur fyri politisku skipanina til viðgerð og samtyktar, ið veitir vissu fyri peninginum.

Standmyndin
Koatnaðurin fyri sjálva standmyndina er um 650.000,- (kostnaðurin fyri stoypingina er ikki fastlagdur enn)
Tað er nakað av tilhøggingararbeiði á steinplátunum – flutningur og uppsetan í Klaksvík er við í hesum kostnaði.
Stuðul, sum er játtaður er um kr. 600.000,- (ikki alt er greitt enn).
Tí veður mælt til, at kr. 50.000,- verða játtaðar afturat til sjálvt keypið av standmyndini.

Lógargrundarlag:
- kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
- ongin avseting er til endamálið, neyðugt verður tí við eykajáttan

Tilmæli:
Mælt verður til
1 - at byggibúningararbeiðið heldur fram, og at eykajáttan á kr. 840.000,- verður at játta til fremjan av økinum kring um standmyndina av Elinborg Lützen.
2 – at kr. 50.000,- verða játtaðar til keypið av standmyndini – hetta sum eykajáttan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. mai 2019
Nevndin mælir til, at peningurin verður tikin av *Byggibúning, bústaðir.*

Mentanarnevndin 21. mai 2019
Nevndin tekur undir við UBN 20-05-2019.

Fíggjarnevndin 28. mai 2019
Nevndin tekur undir við UBN 20-05-2019 og MeN 21-05-2019, og at peningurin verður fluttur millum kontur.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá FíN 28-05-2019 einmælt samtykt.

83/19
19/00472-8 Játtanin til NR – játtan í mun til tørvin – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	21.05.2019	32/19
2 Fíggjarnevndin	28.05.2019	64/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	29.05.2019	83/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	27.06.2019	

Frágreiðing um málið:
Mikudagin 27. februar 2019 var ráðstevna í KÍ høllini. Endamálið við ráðstevnuni var at lýsa barna- og ungdómsøkið í Klaksvíkar kommunu og at seta út í kortið, hvørja leið Klaksvíkar kommuna skal fara, fyri at øll børn og ung í kommununi skulu fáa eitt gott lív.

Í Barna- og ungdómsvirðunum, sum Klaksvíkar kommuna samtykti í 2016, stendur millum annað:

"Klaksvíkar kommuna skal verða ein kommuna fyri øll, har hon ásannar, at øll menninskju ikki eru fødd inn í henda heim við somu fortreytum. Tí eru barna- og ungdómsvirðini galdandi fyri øll børn og ung – eisini tey við serligum avbjóðingum"

Í Klaksvík eru umleið 99 % av børnunum í aldrinum frá 1 ár til 3. flokk í kommunalu ansingarskipanini. Umleið 15 % av børnunum hava avbjóðingar á ein ella annan hátt. Í løtuni hava umleið 10 børn tørv á at verða stuðlaði í at fáa lut í felagsskapinum við onnur børn, men sum ikki fáa tann stuðul, ið teimum tørvar, orsakað av, at játtanin ikki strekkir til.

Játtanin til *tímar, serligur tørvur* er í 2019 kr. 987.000.

Í tíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. mars 2019 hevur nýtslan verið kr. 256.222,11 ella 25.96 % av játtanini. Umroknað til 12 mánaðir verður tað 1.023.888 kr. Hetta er kr. 37.888 meira enn avsett er.

Allir stovnarnir hava ikki sent rokningina fyri mars, so eitt sindur av fyrivarni skal takast fyri omanfyri nevndu tølum.

Á áðurnevndu ráðstevnu varð vístá, at Klaksvíkar kommuna hevur økt talið á dagstovnaplássum í kommunalu skipanini, men játtanin hjá Námfrøðiligu ráðgevingini (NR) er ikki økt samsvarandi.

NR heitir á trivnaðarnevndina børn & ung um at taka undir við uppskotinum hjá forkvinnuni um at hækka játtanina til Námsfrøðiligu ráðgevingina.

Lógargrundarlag:
§ 5 í Dagstovnalógini.

Fíggjarligar avleiðingar:
Námsfrøðisliga ráðgevingin metir, at um játtan teirra varð økt við kr. 100.000, so hevði hetta munað væl.

Í inniverandi ári kann økingin av játtanini til NR fíggjast við at flyta av kontu Barnaansing felags og Stuðul Amanna/Heilsu.

Um so er at nevndin tekur undir við tilmælinum, má havast í huga í samband við fíggjarætlanina fyri 2020, at játtanin til NR skal hækka.

Tilmæli:
Mælt verður til at hækka játtanina til NR við kr. 100.000, sum í inniverandi ári verður fíggjað við flyting millum kontur. Ísv. fíggjarætlanina fyri 2020 skal játtanin til NR hækka við kr. 100.000.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. mai 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 14-05-2019

Fíggjarnevndin 28. mai 2019
Nevndin tekur undir við B&U 21-05-2019.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá FíN 28-05-2019 einmælt samtykt, við teirri viðmerking, at játtanin fyri 2020 verður tikin upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2020.

84/19
18/01235-10 Meirútreiðslur vegna økt barnatal í Snjallubjallu – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	21.05.2019	48/19
2 Fíggjarnevndin	28.05.2019	62/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	29.05.2019	84/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	27.06.2019	

Frágreiðing um málið:
Hóast avbjóðingar eru at finna hølir til økt barnatal í Snjallubjallu eftir summarferiuna, tykist tað at vera politisk undirtøka fyri, at ansingartrygd skal veitast til tey umleið 20-25 børnini, sum annars ikki sleppa inn. Hetta sambært Beintu Klakstein, forkvinnu í TrN Børn & Ung.

Málið var fyri MeN í januar, har samtykt varð at beina málið aftur í umsitingina at finna aðra loysn enn KÍ-høllina.

Forkvinnan hevur, saman við Trivnaðarstjóranum, kannað onnur møgulig hølir. Millum annað, hevur man hugt at Batmintonhøllina, har vit frammanundan leiga og harvið ráða yvir tveimum hølum.

Hallarleiðarin var sera jaligur um at finna loysnir til frítíðarskúlan og vísti okkum á aðrar møguleikar fyri rúmi í avmarkað tíðarskeið í Batmintonhøllini. Talan er um part av svalanum inni í høllini, sum kann nýtast, til onnur og betri hølir verða tøk. Hesa ætlan tekur umsitingin og leiðarin í Snjallubjallu, Beinta Klakstein, undir við sum eina fyribils loysn.

Mælt verður til, at politisku nevndirnar taka støðu til eykajáttan til rakstur vegna víðkað virksemið í Snjallabjallu til børn úr 1. og 2. flokki.

Lógargrundarlag:
-Áseting í kunngerð frá Landslæknanum um fermetrar pr. barn
-Áseting vegna brunakrøv
-Dagstovnalógin áleggur kommununum at útvega hóskandi hølir til dagstovnar v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:

	Um ári	í 2019 (4,5 mðr)
Rakstur til 22 pláss	856.000 kr.	321.000 kr.
Foreldragjald	231.000 kr.	86.625 kr.
Kommununnar partur	625.000 kr.	**234.375 kr.**
Húsaleiga (meting)	60.000 kr.	22.500 kr.
Innbúgv		25.000 kr.
Broyting av hølum í tráð við virksemið		30.000 kr.
Tilsamans	685.000 kr.	**311.875 kr.**

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður biðið um politiska heimild til at gera eina fyribils hølisloysn í batmintonhøllini, meðan málið um endaliga hølisloysn verður viðgjørd av avvarðandi deild og nevndum.
Vegna økt barnatal í Snjallubjallu verður biðið um eykajáttan til frítíðarskúlan Snjallabjalla á 311.875,- kr. til fígging av hesum økta virkseminum vegna økjandi barnatal í frítíðarskúlanum.
Samstundis verður heitt á politisku skipanina um at viðgera spurningin um endaliga hølisloysn til økta virksemið í Snjallubjallu.

Mentanarnevndin 21. mai 2019
Nevndin tekur undir við hølisloysnini í Badmintonhøllini, og at minst møgulig inntriv verða gjørd á ítróttarvirksemi. Loysnin verður endurskoða í apríl komandi ár.

Beinta Klakstein fór av fundinum undir viðgerðini av hesum máli.

Fíggjarnevndin 28. mai 2019
Nevndin tekur undir við MeN 21-05-2019 í samband við hølisloysnina.
Ein minniluti, SVJ og TJL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-05-2019, og at peningurin verður tikin av *Tøkum peningi.*
Ein annar minniluti, GvK, mælir til, at peningurin verður tikin av *Barnaansing, felags.*
Ein triði minniluti, HJS, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Beinta Klakstein fór av fundinum undir viðgerðini av málinum.

Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá SVJ og TJL í FíN 28-05-2019; tað fall við 1 atkvøðu fyri (JS), 4 atkvøðum ímóti (GvK, HJS, BJ og SOJ) og 5 blonkum atkvøðum (SVJ, TJL, KEZ, ÓML og ASJ).
Atkvøtt varð síðani um minnilutatilmælið frá GvK í FíN 28-05-2019; tað varð einmælt samtykt við 10 atkvøðum fyri.

85/19
19/00502-4 Tónlistaskúlin - hækkað lønarstøði eftir sáttmálasamráðingar – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	23.04.2019	39/19
2 Fíggjarnevndin	30.04.2019	58/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	02.05.2019	65/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	29.05.2019	85/19

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 2. mai 2019.

Mentanarnevndin 23. apríl 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2019.

Fíggjarnevndin 30. apríl 2019
Nevndin tekur undir við MeN 23-04-2019.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá FíN 30-04-2019 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 29. mai 2019
Tilmælið frá BýR 02-05-2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.